# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jákup Hansen 90 ár



Mikudagin 14. september fylti Jákup Hansen, vanliga nevndur skómakarin, við Gøtugjógv, 90 ár.

Jákup er ættaður úr Syðrugøtu. Foreldrini vóru: Anna Súfie og Elias Hansen á Fløttinum í Syðrugøtu.

Sum ungur var Jákup eini tvey ár til skips, men gavst tí hann slapp ikki av við sjóverkið. Ístaðin fór hann í læru sum skómakari tann 1. apríl 1933 hjá Knút Petersen skómakara í Havn.

Í 1937 byrjaði Jákup fyri seg sjálvan sum skómakari við Gøtugjógv. Umframt at umvæla skógvar byrjaði hann í 1947 eisini at selja skógvar.

Undir krígnum hevði hann nógv samband við ensku hermenninar, sum vóru í Gøtu tá.

Hann arbeiddi eisini sum vegformaður hjá Landsverkfrøðinginum í Eysturoy í 24 ár. Hann koyrdi t.d. kavablásarin fleiri vetrar, og minnist hann aftur á nógvar hættisligar løtur á Leirvíksvegnum hesa tíðina.

Jákup hevur umvalt skógvar líka til hann í vár var so óheppin at detta og fekk skaða. Hann hevur eisini latið nógvar skógvar, serliga til tey sum koyra til Rumenia við neyðhjálp. Men eisini til føroyingar sum av ymiskum orsøkum eru komnir illa fyri. Skósøluna við Gøtugjógv, sum hann byrjaði í 1947 og skjótt hevur 60 ár á baki, rekur abbasonurin Terji Hansen í dag.

Jákup er seinnu árini kendur sum ein sannur russaravinur, og hevur hann havt gott samband við russiskar sjómenn, sum hava ligið á Skála. Hann hevur t.d. hjálpt teimum at keypa gamlar bilar og gingið teimum til handar í aðrar mátar. Í dag eigur Jákup nógv vinfólk í Russlandi, sum hann hevur brævasamband við. Hann hevur eisini verið heiðraður av russiska fiskimálaráðharranum fyri at hava tikið sær væl av russarum í Føroyum.

Jákup hevur verið trúfastur til møtini í Filadelfia í Gøtu, og nógvir av útlendsku trúboðarunum sum hava vitja oyggjarnar hava notið gott av hansara hjálpsemi. Hann hevur t.d. koyrt teir til tey ymisku støðini at halda møtir.

Jákup hevur altíð havt stóran áhuga fyri bilum og dámt at koyra við góðum bilum. Tað eru nokk fleiri sum minnast hansara fínu Rambler bilar frá 60-unum.

Jákup giftist við Marsonnu, sum var ættað frá Gøtugjógv. Foreldur hennara vóru: Katrina og Jóhannes Jacob Hansen við Gøtugjógv.

Marsanna og Jákup fingu fýra børn: Kári, f. í 1939, Anna f. 1943, Jóannes f. 1945 og Líggjas f. 1947. Kári og Jóannes búgva við Gøtugjógv, Anna býr á Skipanesi og Líggjas býr í Klaksvík. Marsanna doyði í 1990, 74 ára gomul. Hon hevði í mong ár frisørsalong í heiminum hjá teimum.

Seinni giftist Jákup við Klaru, sum er russisk og var ein av manningini á einum av russisku trolarunum, sum lá á Skála. Abbabørnini hjá Jákupi eru 14 og langabbabørnini eru 10 í tali.

Føðingardagurin varð hildin saman við familjuni.

## Johannes Andreas Næs 85 ár



Fríggjadagin 16. september verður Johannes Andreas Næs í Havn 85 ár.

Johannes Andreas er ikki hvør sum helst. Hann er hvalbingur og hevur búð í

Havn síðan 1966. Hann er ein maður við góðum evnum sum gjøgnum eitt langt lív hevur avrikað nógv, bæði á andaliga og mentunarliga økinum og innan skúlagátt. Hann hevur við sínum róliga sinni og vinnandi medferð havt sera lætt við at samstarva við ein hóp av fólki.

Eftir at hann tók læraraprógv Føroya Læraraskúla í 1942, var hann lærari í fleiri ymsikum bygdum í Suðuroy, til hann í 1962 fyribils varð settur sum skúlaráðgevi í serundirvísing fyri alt landið, og frá 1. november 1965 var hann útnevndur í nýggja starvið sum skúlaráðgevi í serundirvísing í Føroyum. Hann hevur eisini útbúgving sum skúlapsykologur.

Johannes Andreas hevur havt fleiri álitisstørv og sitið í nógvum ymiskum nevndum. Hann var fyristøðumaður fyri tekniska skúlan í Vági frá 1951-63, og í 1959 var hann valdur sum limur í Føroya Skúlabókagrunn, har hann var formaður frá 1966-85. Hann var formaður í Føroya Lærarafelag 1960-1968.

Johannes Andreas hevur verið sera virkin innan Heimamissiónina í Føroyum, og hann hevur yrkt og týtt fleiri sálmar og sangir, umframt at hann var blaðstjóri á Sunnudagsblaðnum í umleið 30 ár. Vegna Heimamissiónina sat hann í nevndini í Føroya Barnaheimi frá 1972-96. Í meira enn 30 ár sat hann í útvarpsnevndini sum ópolitiskt umboð fyri Kristiligt Lurtara-Síggjarafelag.

Hann hevur gjøgnum árini eisini skrivað ymsar greinar um skúlamál og evnað til undirvísingartilfar og skrivað fleiri bøkur. Saman við øðrum hevur hann lagt til rættis skúlabøkur í føroyskum og kristni.

Johannes Andreas er framvegis virkin, og í fjør gav hann út bøkurnar: "Varðar á kirkjugøtuni" og "Í Leirum og úr Leirum", sum er ein lýsing av føroyskari kirkju- og missiónssøgu. Eitt triðja bind kemur út í næstum.

Foreldrini hjá Johannes Andreasi vóru: Juliane Katrine, f. Hammer av Hamri, og Magnus Martin Næs í Nesi, bæði úr Hvalba.

Jóhannes Andreas er giftur Brynhild Mariu Stenberg úr Sumba. Tey eiga fýra børn: Unna, Martin, Uni og Julianna. Unna og Uni búgva í Fuglafirði, Martin býr í Havn, og Julianna í Leirvík. Barnabørnini eru 11 í tali.

Føðingardagurin verður hildin í Fuglafirði saman við børnunum.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Saloma Frederiksen, Múli**, andaðist á Norðoya Røktarheimi sunnudagin 11. september, 92 ára gomul.

Kistan fer frá kapellinum hóskvøldið klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13.30 frá Christianskirkjuni í kirkjugarðin í Norðdepli.

Tey, sum vilja minnast Salomu, kunnu lata Norðoya Røktarheimi eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

**Absalon Tvørfoss úr Norðragøtu** andaðist í heiminum sunnudagin 11. september, 70 ára gamal. Kistan fer úr heiminum í kirkjuna í Gøtu mikudagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 14.00.

Tey, ið vilja minnast Absalon, kunna lata Kirkjuliga Missiónsfelagnum eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Charlotta Christiansen, Porkeri,** andaðist mánadagin 12. september, 95 ára gomul.

Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Charlottu, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsið í Porkeri.

### Dagurin

**16. september. Eufemia**, deyð umleið ár 300. Kvinnuligur pínsluváttur, tikin av døgum undir Diocletianus keisara. Femja er konufólkanavn, sum hevur verið brúkt í Føroyum og eisini kemur fyri í nýggari tíð.

Grikst navn sum merkir *gott umdømi.*

Almenn móttøka

Í sambandi við at nýggi dagstovnurin á Flatinum á Oyrarbakka er tikin í brúk, er almen móttøka á stovninum fríggjadagin 16.sept. frá kl. 18.00 – 20.00.

Sunda Kommuna
400 Oyrarbakki